# machomentanini

hetta kanska eisini er medvirkandi til, at kynsspurningurin er sloppin at menna seg so fatalt í útjaðaranum, sum hann í roynd og veru hevur: at granskarar innan fólkafrøði hava ikki í nóg stóran mun sett hendan spurningin nóg ovarliga á dagsskrá higartil.

Tí allar kanningar vísa, at undirskotið av kvinnum í útjaðaranum er vaksandi, og útlitini fyri bata fá.

Millum klóku høvdini, sum talaðu í Alta vóru norski granskarin Lindis Sloan frá KUN, Center for Kundskab og Ligestilling, Kristianna Winther-Poulsen, cand.mag. og forkvinna í føroysku Javnstøðunevndini, seniorgranskarin Rasmus Ole Rasmussen frá Nordregio og Anna Karlsdóttir, lektorur á Háskóla Islands.

Hesi eru øll samd um, at skulu kvinnurnar støðast betri, er neyðugt, at útjaðarin eisini lagar seg til teirra tørv. Bæði í mun til vinnustruktur og kynsleiklutirnir. Alternativt ganga økini einum vissum deyða í møti - tíverri.

Vit vita, at væl meiri enn helvtin av teimum lesandi á miðnásskúlunum og á fleiri hægri lærustovnum í dag eru kvinnur. Og allar kanningar vísa, at júst hetta við útbúgving og persónligum menningarmøguleikum eru faktorar, sum kvinnurnar hámeta. Hetta er eisini orsøkin til, at kvinnurnar helst flyta til stórbýir, sum eisini eru universitetsbýir. Við útbúgvingarstovnum fylgja ungdómar, mentanartilboð, frítíðarmøguleikar, meiri javnstøða, meiri modernaðir makar og margfeldi sum heild.

### Modernaðar kvinnur

Men, hví flyta kvinnurnar burtur? Og hvat kundu tær hugsað sær var øðrvísi, skulu tær flyta heim aftur? Og hvørjar avleiðingar hevur tað fyri eitt samfelag, at kvinnurnar flyta burtur?

Her vísti Kristianna Winther-Poulsen, forkvinna í Javnstøðunevndini, á fleiri ting, sum vit vita hava ávirkan. At kvinnurnar ynska fleiri mentanar- og frítíðartilboð, betri vælferðartænastur, ein minni siðbundnan og maskulinan arbeiðskultur, fleiri fakligar og persónligar avbjóðingar og so framvegis. Alt viðurskifti, sum tann modernaða kvinnan metir høgt.

Samstundis eru fleiri ting, sum fær kvinnuna at umhugsa at flyta heim, og sum tær, sum búgva í Føroyum, meta høgt. Hetta eru faktorarsumfelagsskapurin, tryggleikin, familjan, vinfólkini, stuttu frástøðurnar, náttúran, friðurin og so framvegis.

Forkvinnan í Javnstøðunevndini nevndi eisini hetta við, at føroyskar kvinnur vóru at kalla ósjónligar í almenna rúminum til fyri fáum árum síðani. Og at tær framvegis eru í stórum minniluta í føroyskum politikki. Eisini vísti hon á, at føroyska vælferðarskipanin hevur nógv eftir at bjóða. Hon minnir ikki sørt um suðureuropeisku skipanirnar, har til dømis barna- og eldrarøkt liggja á kvinnunum. Til dømis hevur verið at hoyrt, at visitatiónsnevndirnar innan eldrarøktina kanna um umsøkjarin eigur døtur ella ikki. Tey eldru, sum eiga bert synir ella er barnleys, koma tá framum, tá pláss er.

Eitt annað, sum Kristianna Winther-Poulsen vísti á, var siðbundna tøgnmentanin, har dubultmoralurin ræður. Hetta er slíkt, sum modernaðar, vælútbúnaðar kvinnur ikki tíma at fáast við. Til dømis, tá politikarar siga, at Føroyar eru paradís á jørð, samstundis sum, at avdúking av happing, hatecrimes og insest er vorðin alt vanligari seinastu 10 árini.

### Síðsti mohikanin

Á norðurlandinum í Íslandi kenna tey væl til hetta við, at kvinnurnar rýma. Anna Karlsdóttir, er lektorur á Háskóla Islands. Hon greiðir frá, at har er støðan tann, at broytingar fara fram innan traditionellu vinnugreinirnar, til dømis landbúnaði og fiskiskapi. Samstundis hava risastórar ídnaðarverkætlanir við aluminium og hydro skapt stóran vøkstur á summum økjum. Men hetta eru arbeiðspláss til mannfólk, sum ferðast til virkini úr øllum økinum – ja, enntá úr øllum heiminum.

Í hesum sambandi hevur Anna Karlsdóttir prátað við nakrar kvinnur um teirra virðir í mun til menningina í økinum, og hvørjar vónir tær hava um framtíðina – bæði persónligar og fyri børnini.

Niðurstøðan av kanningini er, at í fleiri bygdum eru útlitini alt annað enn bjørt, og kvinnurnar rættiliga svartskygdar. Stóru broytingarnar í fiskivinnuni ávirka sjálvsagt eisini lívsstøðuna í familjunum. Kvinnurnar hava vanliga størv innan tað almenna (útbúgving, umsorgan og mentan), og samstundis hava tær ábyrgd av heiminum, har tær brúka í miðal 40 prosent av tíðini á degnum. Samanlíknað við mennirnir, brúka teir bert 10 prosent av tíðini til húsligt arbeiði.

Hjá nógvum kvinnum í bygdunum er familjan flutt burtur. Familjan hevur annars verið fremsta insitamentið fyri at verða verandi. Og tá mannfólkini noyðast at ferðast burtur fyri at arbeiða í ídnaðinum, kenna kvinnurnar seg ofta sum tann síðsti mohikanin.

Sambært Onnu Karlsdóttir, bendir alt á, at kvinnurnar eru meiri fleksiblar, tá tað ræður um at skifta starv og at taka útbúgving. Mennirnir eru eisini mobilir, men mest í mun til at ferðast eftir arbeiði. Tí eru kvinnurnar í dag græseinkjur, eins og í fiskivinnusamfelagnum, har tær vóru sjómanskvinnur.

Men spurningurin er, hvussu leingi tær tíma at verða verandi í einari bygd, har familjan er flutt burtur og maðurin býr á arbeiðsplássinum stóran part av tíðini. Tí umhugsa tær støðuna, tá børnini eru vorðin so stór, at tey skulu undir útbúgving. Júst hetta vegamótið er avgerandi fyri, um kvinnurnar verða eftir ella fara avstað.

### Macho ella cand.mag

Ein annars spurningur, sum varð uppi at venda á ráðstevnuni, var modernaði livihátturin, tolsemi og javnstøða í mun til trivna í útjaðaranum. Lindis Sloan, norskur granskari, staðfesti í sínum uppleggi "It's all about gender…", at ein bygd skal hava í minsta lagi eitt bøssapar og ein grafiskan designara!

Í hesum liggur boðskapurin um, at neyðugt er at skapa eitt livandi samfelag, sum kennist lokkandi hjá ungdóminum og serliga teimum ungu kvinnunum, ið eru so ídnar at sleppa avstað til stórbýin.

Hennara gransking í norska útjaðaranum vísir, at ein høvuðsorsøk til vantandi trivnaðin hjá kvinnunum er kenslan av vantandi javnstøðu, og at siðbundnu kynsleikutirnir ræðir kvinnurnar burtur. Tær vilja eisini sleppa at taka lut í politiskum arbeiði og avgerðum.

- Hyggja vit eftir býunum, finna vit eitt stórt yvirskot av kvinnum. Har finna vit eisini universitetini, sjúkrahúsini og stóru miðnámsskúlarnir. Og tú hevur javnari kynsbýtt arbeiðspláss. Á bygd finna vit harafturímóti eina meira kynsuppbýttan arbeiðsstruktur.

- Menn halda tað vera spennandi at fiska, veiða og so framvegis. Kvinnurnar vilja heldur hava eitt meira sosialt umhvørvi við møguleikum fyri útbúgving og mentan, segði Lindis Sloan.

### Vinnan má við

Rasmus Ole Rasmussen frá Nordregio, sum er í fer við at kanna fólkafrøðiligu støðuna í Norðuratlantshavi, heldur tað vera ein vansi, at útjaðarin ofta gera vinnuligar og politiskar satsingar, sum venda seg ov nógv til mannfólk.

Hesum tók Lindis Sloan undir við. Hon greiddi í hesum sambandi frá um siðbundnu norsku smásamfeløgini, har ein yvirvági av gomlum dreingjum búgva einsamallir og arbeiða. Kvinnurnar verða stygdar burtur av mannahørmi frá fiskivinnu, skógarrøkt og landbúnaði, og stórum inntøkugevandi vinnuverkætlanum so sum stál-, olju- og málmídnaði, har útlendskir arbeiðarar virka í styttri tíðarskeið í senn. Men hesir byggja onki lokalsamfelag, og tí kunnu hesar verkætlanir ikki standa einsamallar, men eiga at verða kombineraðar við onnur samleikaskapandi tiltøk, sum eisini geva kvinnunum arbeiði og innihald, so ungu familjurnar kunnu trívast.

Ein partur av loysnini liggur tí í menningini av vælferðarskipanini, granskingarverkætlanum, kreativum vinnum og øðrum økjum, sum lokka kvinnurnar heim.

### Mugu festa røtur

Tað kann bæði vera hugaligt og ikki, tá kanningin hjá Lindis Sloan eisini vísti, at hava kvinnurnar fyrst fest røtur og fingið børn, fara tær sjáldan avstað aftur.

Tí má stóra avbjóðingin vera at lokka kvinnurnar heim á klettarnar aftur, áðrenn tær náa at festa røtur í tí fremmanda. Og so at skapa grundarlag fyri, at tær festa røturnar væl og virðiliga í føroyska mold, tá tær koma heim.

Ella gera, sum fleiri mæltu til á ráðstevnuni í Alta: gera nógv lagaligari útlendingareglur, so onnur fólkasløg kunnu koma her upp og byggja land.

Tí eitt er vist – vælferðarbyrðan og menningin av samfelagnum verður ikki lyft av pensiónistum, smábørnum og gomlum dreingjum eina.

# Ein ordans avbjóðing at flyta heim

Eg og álendski maðurin, Kristian, fluttu til Føroyar við tvey og fýra ára gomlu synum okkara í januar í ár. Nú, eftir fýra mánaðir heima, má eg viðganga, at tað als ikki var so lætt at flyta heim, sum eg hevði roknað við.

Lítið verður tosað um teir praktisku trupulleikar, sum stinga seg upp, og so ikki minst hvat sjálv flytingin kostar í krónum og oyrum.

Nógv fín orð verða havd á loftið, tá útisetar skulu lokkast heim aftur til Føroya.

Spurningurin er, um útisetarnir sjálvir skilja hesi orð, eftirsum tað føroyska málið ikki er tað sama, aftan á fleiri ár uttanlands

Tað var í januar, at eg og maðurin avgjørdu at flyta heim til Føroyar. Vit ringdu beinavegin til kommununa, fyri at fáa dreingirnir á bíðilista til barnaansing. Men vit fingu at vita, at tað sá svart út, og at vit ikki skuldu droyma um at fáa pláss fyrr enn í august.

Næsta samrøða var við Akstovuna um bilin, sum var ein sjey ára gamla Saabur. Tey vóru sera beinasom og sendu okkum hetta roknistykki:

**Nývirðið á bilinum varð sett til: 185.643 kr.**

*Skrásetingargjald: 46.411 kr.*
*Co2 avgjald: 28.000 kr.*
*Burturbeining: 5.000 kr.*
*Sýn: 350 kr.*
*Nummarplátur: 500 kr.*
*Tilsamans uml. 80.000 kr.*

Also skuldu vit rinda umleið 80.000 krónur fyri at innflyta okkara sjey ára gamla SAAB!

Vit kannaðu sjálvandi bilprísirnir í Føroyum, og hvat vit fingu fyri bilin, um vit seldu hann, áðrenn vit komu til Føroya. Men nei, hasar 80.000 loystu seg í síðsta enda best at gjalda.

Hesi bæði tingini – barnaansingartrupulleikarnir og kostnaðurin at innflyta bilin, eru ikki nevndir, tá útisetaspurningurin er á breddanum.

Men fyri okkum, sum flyta til Føroyar, er hetta av alstórum týdning. Tí hóast alt er tað húsarhaldskassin, sum skal gjalda fyri flytingina, og má ein taka lán fyri at klára hesa fíggjarligu byrðu, er lætt at missa mótið, og at verða verandi í tí tryggu tilveruni uttanlands.

Vit avgjørdu kortini at venda heim. Tí, skuldi tað verða – so skuldi tað verða nú.

Sum Katrin Holm í Snarskivuni segði í grein her í blaðnum í gjár, so trúgva flestu útisetar, at tað nokk man fara at laga seg, tá man er komin heim. Ein positivur hugburður, sum vísur, at útisetarnir hava álit á heimlandinum.

Hjá okkum legðist steinur oman á byrðu, tá yngsti sonurin ikki fekk pláss í barnagarði. Meðan eg gekk heima og bíðaði eftir boðum frá Snarskivuni, vuksu útreiðslurnar.

Sum tit kanska skilja hevur okkara flyting ikki verði nøkur løtt ella bílig søga.

Men hóast hetta – trúgv tí ella ikki – so eri eg glað fyri, at vit tóku stigið at koma heim. Eg veit ikki, um vit verða verandi í Føroyum. Men eitt veit eg, at um vit ikki komu heim, hevði eg gingið restina av lívinum og hugsað um, hvussu tað mundi verið at flutt heim til Føroyar.

Men, nú veit eg, at tað kann bara ganga framá.

**G.G.** Sonurin slapp inn í barnagarð á Velbastað aftan á 9 mánaðir á bíðirøð.

**G.G.G.** SAABurin rullar runt í Havnini, og nummarpláturnar eru av gulli:)



*Inna Törnroos, journalistur á Sosialinum*